búnaðarstovan

# Umsóknarblað til stuðul av játtanini til føroysk seyðaskinn

**Umsøkjari:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Felag:** | | **Telefon:** | |
| **Navn:** | | **Teldupostur:** | |
| **Bústaður:** | | **V-tal / P-tal:** | |
| **Bygd / býur:** | | **Konto:** | |

**Umsókn um stuðul til garving av føroyskum seyðaskinnum 2020.**

Í Løgtingsfíggjarlógini fyri 2020 eru játtaðar 300 túsund krónur til at stuðla garving av føroyskum seyðaskinnum. Endamálið við játtanini er at tryggja, at føroysk seyðaskinn koma til høldar. Stuðul verður veittur sum endurgjald fyri djóralæknakanningar og -váttanir og fyri flutning úr og til Føroyar í sambandi við, at skinnini verða send av landinum til garvingar. Játtanin verður umsitin av Búnaðarstovuni. Síðsta freist at søkja um stuðul av játtanini fyri 2020 er hin 01.11.2020.

**Reglugerðin um treytirnar fyri veiting av stuðulsjáttan til føroysk seyðaskinn er tøk á www.bst.fo.**

**Úrdrag úr reglugerðini kann lesast á síðu 2 á umsóknarblaðnum.**

Fíggjarætlan:

| | | |
|---|---|---|
| Útreiðslur til djóralækna: | Kr. | |
| Útreiðslur til flutning úr Føroyum: | Kr. | |
| Útreiðslur til flutning til Føroyar: | Kr. | |
| Aðrar viðkomandi útreiðslur: | Kr. | |
| Útreiðslur samanlagt: | Kr. | 0 |

Eg vátti at hava kunnað meg við treytirnar fyri stuðlinum.
Eg vátti somuleiðis, at givnu upplýsingar eru rættar.

staður dagfesting undirskrift umsøkjarans

Búnaðarstovan • Frammi í Dal 166 • FO-410 Kollafjørður • Tel 479000 • Fax 479020 • bst@bst.fo • www.bst.fo

# Brot úr

# Reglugerð fyri veiting av stuðulsjáttan til føroysk seyðaskinn

## Endamál

**§ 1**. Endamálið er at tryggja, at føroysk seyðaskinn koma til høldar.

## Stuðulstreytir

**§ 2.** Stuðul kann latast einstaklingum, virkjum og feløgum, sum eru bókhaldsskyldug og mvg-skrásett.
*Stk.2.* Stuðul verður latin til djóralæknakanningar í sambandi við, at skinn skulu flytast av landinum at garva.
*Stk. 3.* Stuðul verður latin til flutning til og úr Føroyum, tá seyðaskinn verða flutt úr Føroyum at garva.

## Umsókn

**§ 3.** Búnaðarstovan umsitur stuðulsjáttanina.
*Stk. 2.* Umsóknir skulu skrivast á oyðublaðið *Umsóknarblað til stuðul av játtanini til føroysk seyðaskinn*, sum er tøkt á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni *www.bst.fo*. Oyðublaðið fæst eisini frá Búnaðarstovuni.
*Stk. 3.* Umsóknarfreistin er 1. november í inniverandi játtanarári.

## Játtan

**§ 4.** Stuðul verður latin, um játtan er til taks á fíggjarlógini, konta 6.33.2.15.
*Stk. 2.* Stuðul verður játtaður umsøkjarum í lutfalli til samlaða talið av skinnum, ið søkt verður um stuðul til.

## Útgjald av stuðuli

**§ 5.** Stuðulin verður útgoldin, tá Búnaðarstovan hevur fingið grannskoðaðan roknskap fyri hildnar útreiðslur, ið eru farnar til endamálið.

## Roknskapur og grannskoðan

**§8**. Roknskapur fyri stuðulsárið skal lúka treytirnar eftir § 21 ella § 22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.
*Stk. 2.* Grannskoðaður ársroknskapur fyri veittan stuðul skal vera latin Búnaðarstovuni áðrenn 1. februar árið eftir stuðulsveitingina.
*Stk. 3.* Hóast ásetingina í stk. 2 kann tann, sum hevur fingið stuðul, sum bara verður veittur eina ferð, og sum er minni enn 100.000 kr., í staðin fyri roknskap lata Búnaðarstovuni frágreiðing við neyðugum próvtilfari í seinasta lagi 1. februar árið eftir stuðulsveitingina.